## Nógv vitja EM-síðuna

Føroyingum dámar væl at gita, hvussu dystirnir í EM-endaspælinum enda. Nú ein vika er farin av kappingini, kann staðfestast, at hundraðtals føroyingar tippa til hvønn dyst á síðuni, em.fo, har tey vitjandi samstundis eru við í kapping um serstakar EM-vinningar. Eitt nú Nintendo Wii spælikonsollar og fartelefonir.




## Kappast á OL-teininum

Sunnudagin skipar Føroya Triathlonfelag fyri kappin á olympiska teininum. Her verður fyrst svomið 1500 metrar. Síðani verða 40 km súkklaðir, áðrenn talan at enda verður um 10 km renning. Svomið verður í Svimjihøllini í Gundadali. Súkklað verður frá svimjihøllini til Kaldbak, til Kaldbaksbotn, aftur til Kaldbak og so til Havnar. Á Hvítanesvegnum, við Plantusøluna verður skift í renniskjógvar. Teinurin frá Plantusøluni til Eik banka Yviri við Strond skal síðan rennast tvær ferðir. Málið er við Plantusøluna.

# Vónin bjargað í yvirtíðini



*38 ára gamli Ivica Vastić var ískaldur, tá hann í yvirtíðini tryggjaði Eysturríki vónina um framhaldandi luttøku í EM-endaspælinum*
*Mynd: Polfoto/AP*

**Pólverjar vóru í øðini. Men hóast brotssparkið helst verður nógv umrøtt, so var eingin ivi um, at Eysturríki hevði uppiborið í øllum førum eitt stig fyri ómakin í gjárkvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dómarin ivaðist ikki, tá hann í yvirtíðini dømdi brotsspark. Á sjónvarsmyndunum var eisini sjónligt, at Lewandowsky væl og virðiliga hevði fatur í troyggjuni hjá mótstøðumanninum, men talan var samstundis um støðu, sum á ongan hátt er óvanlig í hornasparksstøðum.

Hvussu var og ikki, so bjargaði hetta Eysturríki eitt uppiborið stig og eina framhaldandi vón um at spæla seg í fjórðingsfinaluna í endaspælinum.

Eysturríki átti kanska longu at avgjørt dystin fyrsta korterið, tá teir tríggjar ferðir skaptu sær upplagdar møguleikar móti einum pólskum liði, ið mest av øllum tóktist ófyrireikað upp á trýstið, sum heimaliðið legði á.

Hickersberger og hansara menn blástu nevnliga til álop frá fyrsta bríksli, men ístaðin fyri at leggja seg á odda, mátti Eysturríki brádliga ásanna, at gestirnir løgdu seg á odda. Roger Guerreiro var skjótastur at fylgja upp eftir skotroynd, og so hjálpti tað lítið, at sami Guerreiro var rangstaddur í støðuni, tí linjuverjin veittraði ikki.

Eftir steðgin kundi Pólland økt, men ein væl leikandi Jürgen Macho helt Eysturríki inni í dystinum. Og so kom brotsspparkið altso. Eitt brotsspark, sum elsti spælarin í kappingini – 38 ára gamli Ivica Vastić – trygt setti í netið.

Kanska var tað eisini heppið, at tað júst var Vastić sum setti bóltin í netið. Eitt av mongu bryggjaríunum í Eysturríki hevði lovað ókeypis øl restina av lívinum til tann spælarin, sum skoraði fyrsta málið fyri Eysturríki. Ein stór ølnýtsla er ikki júst tað, sum hóskar best til eina tilveru sum yrkisspælari, men nú Vastić stendur fyri pensjónsaldrinum á fótbóltsvøllinum, nýtist honum ikki at taka heilt somu atli.

# Tindar og dalar hjá Eysturríki

**Brotssparkið móti Póllandi bjargaði Eysturríki frá stóra vónbrotinum hóskvøldið. Og gevur enntá møguleika fyri stórum fagnaði í seinasta dystinum, har lagt er upp til brak móti Týsklandi. Og upp- og niðurtúrar innan fótbóltin eru nakað, sum eysturríkar kenna til**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*hersim@sosialurin.fo*

**1924**: Eysturríki verður fyrsta landið uttanfyri Stóra-Bretland, sum ger reglur um yrkisfótbólt, soleiðis at bestu leikarnir kunnu liva av ítróttini hjá sær.

**1927**: Eysturríki tekur stig til kappingina, sum verður nevnd "Mitropa Cup", sum var ein kapping fyri tey bestu liðini í Mið- og Suður-Evropa. Kappingin verður seinni nýtt, sum frimil til Evropa Cup kappingarnar, sum byrja í 1950-unum. Mitropa Cup heldur fram líka til 1992, bert steðgað av krígsávum, og í 1979.

**1930**: Rapid Wien gerst fyrsta eysturríkska liðið, sum vinnur Mitropa Cup.

**1931**: 1. Wiener FC vinnur Mitropa Cup. Eysturríkska fótbóltslandsliðið, millum manna nevnt "Das Wunderteam" bergtekur Evropa við góðum fótbólti. Bestu dystirnir er 5-0 sigurin á Skotlandi, og 8-2 sigurin á Ungarn. Millum 1931 og fram til HM-endaspælið í 1934 tapir landsliðið bara 2 av 26 landsdystum.

**1933**: Austria Wien vinnur Mitropa Cup.

**1934**: Eysturríki gerst nr. 4 í HM-endaspælinum í Italia. Teir vinna 2-1 á Ungarn í fjórðingsfinaluni, men tapa 0-1 ímóti italsku vertstjóðini í hálvfinaluni. Bronsudystin ímóti Týsklandi tapa eysturríkarar 2-3.

**1938**: Eysturríki verður slúsað uppí tað stórtýska ríkið. Aftaná, at "Anschluss" er sett í verk verða teir bestu eysturríksku spælarnir tiknir uppí týska landsliðshópin. Stóra undantakið er tann framúrskarandi teknikkarin, Mathias Sindelar, sum ber seg undan at spæla á stórtýska landsliðnum. Rapid Wien gerst týskur steypavinnari eftir ein 3-1 finalusigur yvir FSV Frankfurt.

**1939**: Mathias Sindelar verður funnin deyður í íbúð sínari. Deyðsorsøkin er ikki kortløgd enn. Aftaná aldarskiftið verður Mathias Sindelar valdur til bæði besta ítróttrmann í Eysturríki í 20. øld, og til besta fótbóltsspælara í Eysturríki í 20. øld.

**1941**: Rapid Wien verða heiðraðirsum "Reichsmeistar", meistaralið í tí Triðja Ríkinum. Teir vinna frammanfyri Schalke04, sum var liðið Adolf Hitler helt við.

**1954**: Í HM-endaspælinum í Sveis vinnur Eysturríki bronsu. Í fjórðingsfinaluni vinnur Eysturríki ein minniligan 7-5 sigur á Sveis, sum er málríkasti dystur í HM-endaspæli nakrantíð. Í hálvfinaluni tapa teir 6-1 móti Vestur-Týsklandi, men teir vinna bronsuna við einum 3-1 sigri á Uruguay.

**1965**: Linzer ASK gerst fyrsta liðið uttanfyri Wien, sum vinnur eysturríkska meistaraskapið.

**1978**: Austria Wien kemur í finaluna í Evropa Cup kappingini fyri steypavinnarar. Í finaluni tapa teir stórt 0-4 móti belgiska Anderlecht. Hetta sama árið hendir "Das Wunder von Cordoba" tá Eysturríki í HM-endaspælinum í Argentina vinnur ein 3-2 sigur á vesturtýsku heimsmeistarunum í miðumfarinum. Hans Krankl, sum skjýtur tvey mál í tí dystinum, skiftir frá Rapid Wien til FC Barcelona, og gerst nummar tvey, tá ársins leikari í Evropa verður valdur hetta árið.

**1982**: Eysturríki og Vestur-Týskland fremja í verki eina stóra gølu undir HM-endaspælinum í Spania. Í Gijon rulla liðini bóltin aftur og fram í 81 minuttir. Tá er støðan 1-0 til Vestur-Týskland, og tað røkkur hjá báðum liðum. Algeria endar við Svartaperi, hóast teir hava sama stigatal, sum tey bæði týsktalandi londini. "Avtalaða" úrslitið førir við sær, at síðsti dystirnir í bólkaspælinum í EM og HM-endaumførum eftir 1984 verða spældir samstundis, fyri at ein slík gøla ikki skal endurtaka seg.

**1985**: Rapid Wien røkkur finaluni í Evropa Cup kappingini fyri steypavinnarar. Í finaluni tapa teir 1-3 ímóti ensku Everton.

**1990**: 12. september hetta árið hendir nakað, sum eingin føroyingur ella eysturríkskur fótbóltsfjeppari nakrantíð gloymir. Landskrona gerst heimstaðurin fyri eina tí størstu sensasjónina í fótbóltssøguni. Eysturríki tapir 0-1 til Føroyar, sum spælir sín fyrsta dyst í einari altjóða kapping nakrantíð. Venjari hjá Eysturríki er Josef Hickersberger, sum fer úr starvinum. Í 2006 fær Hickersberger afturval, sum eysturríkskur landsliðsvenjari.

**1992**: Besti eysturríkski venjarin nakrantíð, Ernst Happel doyr 66 ára gamal. Umframt at vinna fleiri meistaraheiti við eysturríkskum feløgum, so vann hann nógv við bæði FC Brügge í Belgia, og Hamburger SV í Týsklandi. Sama ár broytir Prater Leikvøllurin navn til "Ernst Happel Stadion".

**1996**: Rapid Wien røkkur aftur finaluni í Evropa Cup kappingini fyri steypavinnarar. Hesaferð tapa teir 0-1 móti fronsku Paris Saint Germain í finaluni.

**2007**: Eysturríki liggur so lágt, sum nr. 101 á FIFA-styrkislistanum. Michael Kriess, sonur fyrrverandi eysturríkska landsliðsspælaran, Werner Kriess skipar fyri savnan av undirskriftum. Átakið hjá Werner Kriess og vinmonnum leggur fram krav, at Eysturríki ikki tekur lut í EM-endaspælinum í 2008.